# Hevði hasj uppií sær

Mánadagin var hasj-hundurin hjá tollvaldinum á flogvøllinum. Sum vant, so slapp hundurin at snodda millum ferðafólkini at vita, hvørt hasj ella líknandi var við í viðførinum hjá onkrum teirra.

Hesaferð steðgaði hundurin hjá eini 19 ára gamlari gentu, men hóast hon varð tikin inn í rúmið hjá tollvaldinum, so dugdu tollararnir ikki at finna nakað uppi á henni.

Tá hundurin framhaldandi sýndi gentuni stóran áhuga, varð gjørt av at senda gentuna til kanningar hjá lækna. Her varð staðfest, at hon hevði stungið 138 gram av hasji upp í seg.

Kjartan Dam Joensen, leiðari á tollbúðini, sigur, at hetta ikki er nakað, sum tey so ofta hava verið út fyri, men tað hendir av og á.

Hvussu er og ikki, so vísti hendingin mánadagin, at heldur ikki hetta sleppur framvið góða tevinum hjá hasj-hundinum. Hóast nøgdirnar í ár ikki hava verið so stórar, sum tær vóru í fjør, so er talið av fongum í ár størri, enn tað nakrantíð hevur verið, sigur Kjartan Dam Joensen. Smáu nøgdirnar eru oftani nógvar, og fyri stuttum varð eitt ferðafólk tikið, sum hevði nakað av heroini á sær.

**- jm**

# Frídømd fyri blokaduvirksemi

Føroya Rættur frídømdi í mánadagin formannin og skrivaran í Havnar Arbeiðsmannafelag. Hesi vóru ákærd fyri brot á politiviðtøkuna í samband við blokaduna á Eystaru Bryggju í Havn tann 4. juni í fjør.

Rætturin fríkendi báðar teir ákærdu, samstundis sum statskassin er dømdur at rinda sakarmálskostnaðin.

Í tíðindaskrivi sigur Havnar Arbeiðsmannafelag seg fegnast um dómin. Sagt veðrur, at hetta vónandi fer at stuðla fakfelagsrørsluni í teirra stríði móti verkfalsbrótarum, sum undir lógliga lýstum verkfalli bjóða seg fram at átaka sær verkfalsrakt arbeiði.

**-jm**

# Valfundur á Læraraskúlanum

Undir heitinum, Felags avgerðir – felags ábyrgd, verður skipað fyri politiskum valfundi á Føroya Læraraskúla hóskvøldið, 4. november, kl. 19.

Tað verða kvinnulig valevni, sum her fáa høvi at bera fram síni sjónarmið, og millum annað verður Bústaðrbygging og –politikkur, ferðsla, barnaansing, eldrarøkt, mentan, vinnulív og umhvørvi millum evnini, sum tosað verður um.

Tað eru løgtingskvinnurnar og umboð fyri flokkarnar á tingi, ið ikki hava kvinnuliga umboðan, sum hava tikið stig til fundin.

Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna, verður orðstýrari á fundinum, sum er almennur.

**-jm**

# Fólkaatkvøða um at leggja Suðuroynna í eina kommunu

**– Nú suðuroyingar skulu á kommunuval um eina viku, skulu teir eisini at sleppa at atkvøða um teir vilja hava alla oynna í eina kommunu, sigur Sumbiar Bygdaráð**

FÓLKAATKVØÐA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jacob Vestergaard stillar ikki uppaftur, so fyribils er hansara leiklutur í kommunupolitikkur liðugur. Men áðrenn hann fer, vil hann hava, at allir suðuroyingar sleppa at siga sína hugsan um kommunusamanlegging á fólkaatkvøðu í næstu viku*

Nú skal fólkaatkvøða verða í Suðuroy um kommunusamanlegging

Tað heldur Sumbiar Bygdaráð.

Bygdaráðið í Sumba hevur í hvussu so er samtykt at fólkaatkvøða skal verða í Sumba um kommunusamanlegging.

Spurningurin, sum sumbingar sleppa at taka støðu til er rættiliga einfaldur. Hann ljóðar soleiðis: Skal Suðuroyggin verða ein kommuna.

Og so skulu veljararnir antin seta krossin við Ja ella við nei.

– Hetta er ein einfaldur og greiður spurningur.Tað er við vilja, at spurningurin er so mikið greiður, tí vit halda, at tað er bara at gera støðuna óneyðuga fløkta at hava fleiri møguleikar á seðlinum.

Samstundis hevur bygdaráðið sent øllum hinum sjey kommununum í oynni skrivliga áheitan um eisini at skipa fyri atkvøðugreiðslu, so at allir suðuroyingar sleppa at siga sína hugsan um kommunusamanlegging.

Sumbiar Bygdaráð heldur, at fólkaatkvøðan um kommunusamanlegging skal vera samstundis sum kommunuvalið er.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri í Sumba, sigur, at kommunuvalið í næstu viku, er eitt frálíkt høvi til eisini at hava eina fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging.

Borgarstjórin sigur, at vanliga eru nógvir suðuroyingar á kommunuvalið, so hetta er eitt gylt høvi til at fáa veljararnar í Suðuroy til eisini at taka støðu til samanlegging í eina kommunu.

### Onki í vegin

Jacob Vestergaard sigur, at hann hevur kannað málið hjá innlendismálaráðnum og haðani verður sagt, at tað er onki í vegin fyri at hava tvey val samstundis.

Men sjálvsagt skal ongin ivi vera og tí verður neyðugt, at teir báðir atkvøðuseðlarnir hava hvør sín lit og tað er eisini neyðugt at hava tveir atkvøðukassar at koyra seðlarnar í.

Sostatt fáa sumbingar hesuferð tveir atkvøðuseðlar, tá ið teir fara á kommunuval næsta týsdag. Annar seðilin verður til kommunuvalið og hin seðilin verður í sambandi við kommunusamanlegging.

# Valstríðið í Suðuroy á netinum

**Nú ber til hjá suðuroyingum at lesa valgreinar uppundir kommunuvalið á Internetinum**

VALSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Valstríðið uppundir kommunuvalið í Suðururoy skal vera sjónligari.

Tað halda teir báðir, Jón Guttesen og Tim Wentzlau á Tvøroyri, sum báðir arbeiða á Auxilior Technology á Tvøroyri.

Teir báðir hava sostatt gjørt ein portal á alnetinum, har teir fara at royna at savna allar valgreinar, øll valevnini og allar listarnar, sum stilla upp til kommunuvalið

Endamálið er at gera kommunuvalið atkomuligari hjá suðuroyingum og ætlandi skal tað bera til at kunnu lesa allar greinarnar, sum valevnini skriva á portalinum.

Annars er eisini ætlanin, at hetta skal vera ein suðuroyarportalur burturav. Hann er gjørdur soleiðis, at tað ber til hjá øllum at leggja greinar. kunngerðir, tíðindi um tiltøk, o.s.f.r á portalin.

Teir báðir stigtakararnir vóna, at eisini kommunurnar kunnu brúka portalin til at kunngerða fyri borgarunum tað, tær hava brúk fyri at kunngerða.

Somuleiðis ber tað til at kjakast á portalinum, sum sæst á www.suduroy.nu

Sosialurin hevur fingið nýggj nummur tel 341800 fax 341801

# ítróttur

Nr. 210 • mikudagur • 3. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Meinhardt verjur GÍ-málið

Tað verður klaksvíkingurin, Meinhardt Joensen, sum komandi árið skal verja málið hjá 1. deildarliðnum hjá GÍ. Her hava gøtumenn annars havt Hallur Hansen seinstu árini, men nú fer hann av landinum í lestrarørindum, og so er neyðugt við nýggjum manni.

Og nú hevur navnið hjá Meinhardt ljóðað í góða viku ella so, og nú verða tíðindini so eisini váttað í Gøtu, har tey siga seg hava gjørt ein eitt-ára sáttmála við málverjan.

Í aðrar mátar vilja gøtumenn ikki siga so nógv um, hvussu liðið fer at síggja út komandi ár. Stóri spurningurin hevur í longri tíð verið, hvørt tað skal eydnast gøtumonnum at halda fast um Súna Olsen. Tað er eingin loyna, at fleiri føroysk feløg heldur enn fegin vilja hava fatur á leikaranum, sum fyri stuttum varð kosin tann besti í farna kappingarári, men enn er so eingin formlig avtala skrivað, sum greitt boðar frá hesum.

Sosialurin skilir tó frá væl vitandi keldum, at tað er ógvuliga sannlíkt, at Súni eisini komandi árið fer at spæla í gula búnanum.

Hartil ljóðar eisini, at tey í GÍ fegin vilja hava Sámal Joensen at fara undir venjingarnar aftur. Hann hevur annars av arbeiðsávum hildið frí frá fótbóltinum í tvey ár, men nú veður talan um skúlagongd á landi, og skuldi ligið betri fyri í so máta. Tað bar tó heldur ikki til at fáa hesi tíðindini váttað, tá vit høvdu samband við leiðsluna hjá GÍ.

**-jm**

# Tíggju met



*Eftir kappingina tók Petur Heðin á Fløtti út Per Síminarsson Hansen og Beinir Danielsen úr Flot, og Annu Kristinu Eysturberg og Juttu Thomsen úr TS til NJM-kapping, sm verður í Nærum, Danmark, í desember mánaði*

**Trý føroysk met og sjey bólkamet vórðu sett, tá HS-stevnan varð hildin um vikuskiftið**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

HS stevnan hevur verið um vikuskiftið 30-31.okt. og má sigast at tað lá væl fyri .

Tað sum vit fyrst mugu leggja merki til er at vit fingu trý nýggj føroysk met, og sjey nýggj bólkamet.

Sum ikki einaferð varð tað Elspa Mørkøre úr FS sum varð stórslúkarin metum viðvíkjandi. Elspa setti nýtt føroyskt met í 200rygg við tíðini 2.27.29 og í 400 blandað við tíðini 5.20.09, bólkametini hon settið í sínum bólki ( 4 ) vórðu: 400 blandað tíðin 5.20.09, 100 rygg tíðin 1.10.22, 200 rygg tíðin 2.27.29, 200 frí tíðin 2.15.71.

Jutta Thomsen úr TS setti nýtt føroyskt met í 800 frí við tíðini 9.39.99 sum eisini var bólkamet í bólki 4.

Beinir Danielsen úr Flot setti nýtt bólkamet í bólki 5 í greinini 100 blandað við tíðini 1.05.7.

Kári J á Høvdanum FS setti nýtt bólkamet í bólki 4 í 200 rygg tíðin 2.20.96.

Úrslitið av kappingini gjørdist:

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| 1 HS | 54 | 35 | 27 |
| 2 FS | 26 | 12 | 7 |
| 3 Flot | 13 | 12 | 6 |
| 4 TS | 10 | 11 | 9 |
| 5 VS | 10 | 9 | 12 |
| 6 Ægir | 9 | 8 | 5 |
| 7 Skegg | 3 | 11 | 8 |
| 8 Reki | 0 | 1 | 0 |

Kristian Olsen úr Ægir svam eisini undir kravtíðina til Oyggjaleikirnar næsta ár í Hetlandi, tað gjørdi hann í greinini 50 frí, tíðin var 24.43

Henda kapping var eisini ein úttøkukapping til kappingina NJM, Nordisk Junior Mesterskaber sun verður í Nærum í Danmark fyrsta vikuskiftið í Desember.

Tey sum kunnu luttaka í ár eru dreingir føddir í 1987 og 88 , og gentir føddar í 1989 og 90. Eftir kappingina tók landsliðsvenjarin Petur Heðin á Fløtti hesi út: Per Síminarsson Hansen og Beinir Danielsen úr Flot, og Annu Kristinu Eysturberg og Juttu Thomsen úr TS .

# Stigaleysir føroyingar

**Holte IF hevur framvegis einki stig vunni sær í bestu donsku flogbóltsdeildini**

Um vikuskiftið leikti Holte móti Marienlyst, sum er nýtt felag í deildini. Hóast nýggir í deildini, so roknað nógv við, at Marienlyst verður eitt av liðunum, sum fer at gera um seg í vetur, og tað var heldur ikki nakar ivi um, hvat liðið var tað betra. Marienlyst vann ein tryggan 3-0 sigur.

Hóast teir eru stigaleysir, so eru vónirnar í Holte framvegis góðar. Enn hava teir fyri tað mesta hitt lið, sum eru mett sum munandi sterkari, men hóskvøldið spæla teir móti Lyngby Volley, og har verður roknað við, at møguleikarnir fyri stigum eru betri, enn teir hava verið higartil.

**-jm**

# FM fyri Veteranar

**Leygardagin 6. november verður árliga Føroyameistaraskapið í Bridge fyri veteranar leikt í Bridgehúsinum í Havn.**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Byrjað verður at spæla kl 10. Spæld verða millum 40 og 60 spøl. Kappingin er skipað sum ein barometur kapping. Tað merkir, at øll spæla somu spøl í sama umfari. Á hendan hátt kann hvørt umfar gerast upp, soleiðis at ein hevur møguleika fyri at síggja sína skoru so hvørt.

Fyri at hava rætt at luttaka í FM Fyri veteranar í bridge, skal parið tilsamans vera fylt 95 ár ,og annar spælarin skal vera fyltur 50 ár. Luttøkan til FM fyri veteranar hevur tey síðstu árini verið góð. Í 2004 vunnu teir báðir sterku og royndu bridgeleikarinir, Carl Mikkelsen og Mortan Rasmussen, kappingina.

Seinsta freist at boða frá luttøku er 4. november kl. 22.00, hjá Róa á Rógvu Joensen tlf. 319491 ella Heðin Mouritsen tlf. 314192

Og so ein lítil rætting til støðuan í liðkappingini í aðru deild. Hon eigur at vera hendan:

| | |
|---|---|
| Jórun | 51 |
| Óli | 50 |
| Hallur | 47 |
| Marita | 45 |
| Ingolf | 41 |
| Sámal P. | 0 |

Sum tað sæst er tað liðið hjá Jórun Johansen, ið er komi best frá byrjan og ikki liðið hjá Óla Holm, soleiðis sum vit skrivaðu ú farnu viku. Vit biðja lesaran halda okkum til góðar.